J.nr.: 7904 K001

# Viðtøkur fyri Fornminnissavnið á Mýri

§ 1

Hovs Fornminnafelag og Hovs kommuna seta á stovn sjálvsognarstovnin Fornminnissavnið á Mýri.

§ 2

Endamál savnsins er:

1. at savna, skráseta, varðveita og vísa fram lutir, sum hava siðsøguligan áhuga og savna frásagnir um nýtslu og søgu teirra,
2. at vekja ans fyri fornminnum í sóknini og innsavningarvirksemi í hesum sambandi og fyri varðveiting av gomlum bygningum og umhvørvi við siðsøguligum virði.
3. Náttúrliga vil savnið kenna ábyrgd av Hovgrímsgrøv, Hovsgrundunum o.ø. søguligum í bygdini.

§ 3

Savnið verður stjórnað av eini 3 mannanevnd, 2 valdir av aðalstýrinum í Hovs fornminnafelag og 1 valdur av Hovs kommunu.
Nevndin skipar seg við formanni, kassameistara og skrivara.
Nevndin hevur ábyrgdina av dagliga starvinum og stendur aðalfundurin í Hovs fornminnafelag til svars fyri ognum og rakstri felagsins.

§ 4

Rakstrarætlan verður løgd fyri landsantikvarin til góðkenningar. Roknskaparárið er álmanakkaárið. Grannskoðaður roknskapur verður saman við frágreiðing frá farna árinum latin landsantikvarinum at góðkenna.

§ 5

Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir § 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 frá 9 mai 1972 við seinni broytingum, um bygsasøvn við mentanarsøguligum virksemi.

§ 6

Hesar viðtøkur fáa gildi, tá tær eru samtyktar av Hovs fornminnafelag og góðkendar av Hovs kommunu, landsantikvarinum og landsstýrinum. Tær broytingar, sum verða gjørdar í viðtøkunum skulu somuleiðis góðkennast av Hovs kommuna, landsantikvarinum og landsstýrinum.

Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi í Fornminnissavninum á Mýri tann 28 des 2003

Finnbjørn Hovsgarð
Heidi Hansen
Jákup Petur Joensen